# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Frits Johannesen 65 ár




Væl kendi toftamaðurin, Frits Johannesen, rundaði tey sekstifimm týsdagin 1. september.

Frits er ættaður úr Tøðuni á Toftum, sonur Michael og Onnu Kristinu Johannesen.

Frits er sera vinsælur og ættkærur. Ikki skerst burtur, at hann í barnaheiminum hevur fingið gott í beinið. Hann heldur sera nógv av sínum børnum og systkjum eins væl og av sínum nógvu vinum og kenningum kring landið – altíð við tí góða orðinum – bæði í álvara og gaman.

Sum flestu føroyskir ungdómar tá á døgum, fór Frits at royna sjógvin. Hann róði út í Grønlandi í mong ár. Soleiðis var Frits við Vaðnum hjá Justinus Hansen á Toftum í 1960, 1961 og 1962. Í 1964 og 1965 róði hann út í Grønlandi við Fiskinum hjá Hanna Højgaard, í Króki, á Toftum. Í 1963 og 1966 var hann við Jógvan Norði, har Jógvan I. Olsen var skipari. Tað verður sagt um Frits, at hann var av raskastu sjómonnum, og hann hevur ført manga stóra veiðina til lands saman við sínum báts- ella skipsfeløgum.

Tó at Frits eisini seinni á lívsleiðini hevur gjørt nakrar skipstúrar, so hevur høvuðsarbeiði hansara síðan 1967 verið á landi sum lastbilførari og grótlaðari.

Tey yngru kenna Frits best sum mannin í Scania lastbilinum. Øll árini síðan 1967 hevur Frits nýtt Scania lastbilar, sum hann heldur so ómetaliga nógv av. Frits er sera røkin maður, og tí hava bilarnir verið sera væl røktir og viðfarnir í øll árini. Núverandi bilur, sum er tann fjórði í Scania-røðini, er frá 1986 – framvegis snøggur og snotuligur.

Kring landið er Frits væl kendur sum grótlaðari. Í mong Harrans ár hevur Frits lagt seg eftir at arbeiða sum grótlaðari. Allastaðni, har hann hevur verið og arbeitt, standa garðar og grótarbeiði hansara sum listarlig prýði og vitna um ein mann, sum hevur avbera gott eyga fyri grótlaðing. Í Eysturoynni síggja vit t. d. hansara listarligu evni: við Vesturskin á Toftum, við skúlarnar á Toftum og í Runavík, við Føroya Banka á Tofum og í Runavík, við kirkjurnar í Fuglafirði, Leirvík og á Glyvrum - og við minnisvarðarnar á Toftum og í Æðuvík.

Góði Frits! Vit vilja ynskja tær hjartaliga tillukku við teimum sekstifimm. Hjartaliga takk fyri gott samstarv og gott vinalag í mong ár. Vit ynskja tær framvegis blíðan byr á lívsleiðini og Guðs signing.

**Vinir**

†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Jóan Petur Petersen, Norðskála,** fer av Røktarheiminum í Runavík mikudagin kl. 17.30. Jarðarferðin verður úr Norðskála kirkju hósdagin kl. 14.

**Linda Nolsøe, ættað av Skipanesi, búsitandi í Tórshavn**, andaðist á Eldrasambýlinum inni á Firði í Kollafirði, sunnudagin 94 ár gomul. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni hósdagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Lindu, kunnu lata Eldrasambýlinum inni á Firði í Kollafirði eina gávu, konta í peningastovnunum.

### Brúdleyp

Leygardagin 5. sept. kl. 12.00 giftast í Skopunar kirkju Jacoba Winther og Jón Tór Baldvinsson, Skopun. Veitslan verður kl. 18.00 í Samljóð í Skopun. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, kunnu siga frá á tlf. 259320 ella 213777 innan hóskvøldið 3. sept.



### Dagurin

2. september. Elisa, profeturin sum kongabøkurnar í Gamla testamenti vita at greiða frá. Í gomlum álmanakkum var navnið skrivað Eliseus, sum kemur av latínska bíbliutýðingini Vulgata. Elisius hevur verið brúkt sum mansnavn í Føroyum. Navnið merkir Gud hevur hjálpt ella Jahve er Gud mín.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

## Rasmus Jacobsen 60 ár



Í dag fyllir Rasmus Jacobsen 60 ár. Hann er føddur í Leirvík 2. septembur í1949, sonur Kristinu og Jógvan Evald, sjómann og bónda í Uppistovu í Leirvík. Hann eigur eina systur, Marjun, gift við Bergi Nón úr Fuglafirði.

Rasmus fann sær konu úr heimbygdini, Sofíu, sum er dóttir Honnu og Klæmint Eliasen. Tey giftust 20. februar í 1971. Sofía starvast sum lærari í Leirvíkar skúla. Tey eiga børnini Jógvan, Hanus og Kristinu, og hava tey eisini havt systurdóttur Sofíu, Honnu til fosturs.

Rasmus fór í læru í 1964 hjá Brøður Petersen (Meka) í Fuglafirði.

Hjúnini fluttu, stutt aftaná tey vóru gift, til Havnar, har Sofía fór á Læraraskúlan og Rasmus arbeiddi á Tórshavnar Skipasmiðju. Síðani fluttu tey aftur til Leirvíkar - Sofia gjørdist lærarinna við Leirvíkar skúla, og Rasmus fór at arbeiða hjá Sigfríði Vørðhamar til í 1980, tá fór hann aftur í arbeiði hjá Brøður Petersen í Fuglafirði. Tey búðu fyrst í húsunum hjá Jákupi Oluf Langgaard í tvey ár, inntil tey bygdu sær egin hús í 1976. Rasmus gjørdist verkførari á lastbilaverkstaðnum hjá Brøður Petersen og helt fram í hesum arbeiði líka inntil 1995.

Síðani 1995 hevur Rasmus arbeitt sum sýnsmaður hjá Akstovuni, og hevur hann her, eins og allastaðni har hann hevur verið, roynst álitismaður. Rasmus hevur havt Uppistovufestið í mong ár, men hevur tey seinastu árini havt uppisitara.

Um vikuskiftið bjóðaði Rasmus okkum norður á Gjáargarð, og hugnaðu vit okkum ófort. Rasmus er burturstaddur á føðingardegnum.

Tillukku við teimum seksti!

**Jógvan, Hanus, Kristina og Hanna við makum og børnum**